

# Smíð eftirútbúgving

## Modul 3, 5 ECTS – Heyst 2024

Tvey tíðarskeið á 3 vikur.

<u>Fyrsta tíðarskeið</u>

| | |
|---|---|
| Vika 38 | Lesa ástøði, fyrireika |
| Vika 39 | Verkstaðararbeiði, fyrilestrar og kjak á Frælsinum |
| Vika 40 | Sjálvstøðugt arbeiði við uppgávum |

<u>Annað tíðarskeið</u>

| | |
|---|---|
| Vika 46 | Lesa ástøði, fyrireika |
| Vika 47 | Verkstaðararbeiði, fyrilestrar og upplegg við kjaki á Frælsinum |
| Vika 48 | Sjálvstøðugt arbeiði við uppgávum |

## Fyrra tíðarskeið – vika 38-40 (16. september- 4. oktober)

**Bókmentur:**

Lesivegleiðing og bókmentur – serstøk skjøl

**Verkligt arbeiði:**

At telgja:

Í fyrru verkstovuni kemur tú at kunna teg við knívar og onnur skeriamboð. Vit koma at telgja bæði í feskum og turrum viði, vit koma at arbeiða við ymiskum sløgum av viði, fyri at koma at skilja hvussu tey eru at fáast við, og hvussu tey egna seg til ymsar arbeiðsmátar og tól. Vit koma eisini at kjakast um trygd og møguleikar at nýta knív í undirvísingini í fólkaskúlanum.

Metall:

Í seinnu helvt av vikuni koma vit at arbeiða við kopar og aluminium, fyri at koma at skilja hvussu vit kunnu forma og skapa ymisk produkt við ymiskum teknikkum. Vit koma at gjøgnumganga hvussu vit kunnu skapa eina skeið úr kopar, og gjøgnumganga hvussu man á einklan hátt kann slaglodda fyri at skapa t.d. eitt ílat ella ein ljósastaka. Vit koma eisini inn á hvussu hesin arbeiðsháttur kann nýtast í skúlaundirvísing til at skapa ymisk íløt, krókar og festi.

Fyrilestur:

Mikudag 25. september Kl 9-10,30
"Prosess ella produkt" við Peter Hasselskog

**Upplegg og kjak:**

| | | |
|---|---|---|
| 24/9 kl 9-10,30 | (JA) | Kreativitet og fantasi |
| 26/9 kl 9-10,30 | (JA) | Produkt og prosess |

## Seinna tíðarskeið – veika 46-48 (11. – 29. november)

**Bókmentur:**

Lesivegleiðing og bókmentur – serstøk skjøl

**Verkligt arbeiði:**

At gera knívar:

Í fyrru verkstovuni koma vit at arbeiða við hvussu ymiskt tilfar kann setast saman fyri at skapa eitt mynstur sum kann prýða eitt knívblað, ein upptrekkjara ella ein ostaskerara. Hvørjir møguleikar og forðingar eru tá eitt skefti verður tilvirkað, vit koma at seta saman ymsikt tilfar fyri at fáa eina fatan av hvussu og á hvønn hátt hetta kann yvirførast til undirvísing saman við næmingum. Vit koma at arbeiða við timbur, metal, leður, horn og vulkanfiber. Í verkstovuni koma vit bæði at diskutera design og úttrykk, og eisini skitsuteknikk, og hvønn leiklut tað hevur í undirvísingini.

Annað tilfar enn træ og metall.

Í hesi verkstovuni koma vit fyri ein stóran part at arbeiða við betong, fyri at skapa eina fatan av hvussu hetta tilfarið kann nýtast. Vit koma at gera formar at nýta til tær ymiskuu stoypingarnar, sum vit gera í verkstovuni. Vit koma eisini at eksperimentera við hvussu hetta kann nýtast í skúlanum á ein hátt, sum skapar bæði møguleikar og avbjóðingar fyri næmingarnar. Vit koma eisini at arbeiða við at brúka glasstengur til at virka ymiskar glasperlur.

**Fyrilestur**

Mikudag 20. november kl 9-10,30

”Námsætlanin og smíð-lærugreinin sum útgangsstøði fyri planlegging og útinnan”.
Noomi i Dali

**Upplegg og kjak:**

| | |
|---|---|
| 19/11 kl 9-10,30 | (JA) Um og rundanum eginleikarnar hjá ymiskum tilfari |
| 21/11 kl 9-10,30 | (ND) Hvussu eitt evni verður lagt til rættis út frá námsætlanini. |